## Gloymdu instrumentir

Í øllum førum er tað komið fyri tvær ferðir, at Dynamit gloymdi instrumentini. Einu ferðina funnið teir útav hesum, tá teir við tómum bussi vóru komnir til Sands, men við at læna eitt nú trummusettið hjá Eils Poulsen, kundu teir kortini spæla til dans. Eina aðru ferð spældu teir á Tvøroyri, men í stuttleikanum eftir dansin gloymdu teir alt um instrumentini, sum í eina viku stóðu eftir á Tvøroyri, áðrenn tónleikararnir komu suður aftur eftir teimum.




## Mark kom í dans

Ta einu ferðina spældi Dynamit til dans í Hvalba, samstundis sum Mark no Limitz spældi á Tvøroyri. Hetta júst um tað mundi, tá Mark no Limitz var í hæddini sum tónleikabólkur. Hvussu er og ikki, so gjørdust teir í Dynamit ikki sørt skakkir, tá tey í Mark no Limitz brádliga vóru í dansi í Hvalba. Orsøkin var einføld. Nevnliga at eingir áhoyrarar vóru til konsert á Tvøroyri.

# 13




*Niclas Heri Jákupsson á odda fyri Dynamitt á Summar Festivalinum í fjør. Emil Gunnarstein spælir bass og Ingi Isaksen ljómborð*
*Mynd: Jóannes Poulsen*

sangir, sum vit øll kenna, og so gerst ikki við, um røddin onkra tíð fer úr rætta durinum. Tað ger hon eisini hjá Dynamit, sum fram um allar er bólkurin, sum sjálvfeitir tónleikaummælarar elska at hata.

Man teirra trupulleiki ikki vera, at teir bara ikki duga at skilja, hví Dynamit eru tað, sum teir eru.

## Sagt um Dynamit

**»Eftir at hava lurtað eftir fløguni, kendist tað, sum hevði heilin tikið skaða, meðan eg var um at fáa krampa undir iljarnar, so nógv eg hevði krimpað tærnar av pínliga tónleikinum«**
***Jan Lamhauge, Dimmalætting***

**»Við løgum sum "Grøv nummar 13" og "Pápi tín býr ei í Tórshavn" megnaðu teir enn einaferð at savna áhoyrararnar og lyfta teir upp í eina hægri eind«**
***Rógvi Nybo, Sosialurin***

**»Hvussu kunnu so nógv fólk njóta nakað, sum so eyðsæð er botn hamrandi vánaligt? (...) Fólk hava eftir øllum at døma ongi tónleikalig góðskukrøv, tá ið tey veruliga kunnu njóta Dynamit.«**
***Jan Lamhauge, Dimmalætting***

**»Teir hava stutt sagt larmað fyri seg, og um ikki kaos, so hava teir í øllum førum órógvað fatanina av, hvat góður tónleikur er. Ella kanska hava teir bara vent ringinum, soleiðis at sjálv upplivingin við tónleikinum er tað, sum ger av, hvørt talan er um góðan tónleik ella ikki. Nakað sum 8.000 áhoyrar til seinastu framførsluna hjá bólkinum eisini bóru boð um.«**
***Jákup Mørk, Sosialurin***

**»Óstuttliga skemtið, løgni sentimentaliteturin og illa spældi tónleikurin varð tó avbera væl móttkin av áhoyrarunum. So væl, at ummælarin bara kundi rista við høvdinum í vantrúgv«**
***Árni Zachariasen, Dimmalætting***

**»Dynamit takkaði fyri seg, tá teir á Summarfestivalinum sungu "Vit vilja ongan tíð doyggja". Takið tað bara róligt. Tit doyggja ongantíð!«**
***Jákup Mørk, Sosialurin***

**»Søkk søkkandi skúta. Søkk!«**
***Árni Zachariasen, Dimmalætting***

**»Skemtið hjá Dynamit er primitivt. Tað handlar um frensar, sum eru gay, ommur, sum drekka seg skít og menn, sum eru bangnir fyri konuni. Teir halda, tað er stuttligt at venda keppinum til síðuna, og at ein í bólkinum verður kallaður Shaky. Á hvønn hátt er hetta stuttligt?«**
***Árni Zachariasen, Dimmalætting***

**»Fløgan, sum allur heimurin hevur bíðað eftir í spenningi. Ein fløga, sum fer at skapa globala debatt millum heimsins ríkisleiðarar og vísindafólk. Ein fløga, har orð og tónar skapa ordan í kaos og lyfta lurtaran upp í atmosferuni. Og sum eins stillisliga ber teg niður aftur á jarðarflatuna«**
***Dynamit***